Síðsta árið í hesari øldini er nú runnið, og vit standa á gáttini til eina nýggja øld. Hetta gevur høvi til at líta aftur um bak, at árinum sum fór og at 90'unum sum heild. Eisini er hetta høvi til at líta at teimum avbjóðingum, ið eru fyri framman.

Árið sum fór og gongdin innan einstøku vinnugreinirnar

Jan Mortensen,
stjóri í Vinnuhúsinum,
skrivar

Í gjøgnum 90'ini hava vit lítlan og ongan lønarvøkstur havt, og kappingarførið hjá vinnuni er tí batnað munandi. At ferð rættiliga aftur er komin á búskapin, sást við lønarsamráðingarnar í vár. Vit fingu árligar lønarhækkingar uppá uml. 3,75% á almenna og gott 4,5% á privata arbeiðsmarknaðinum, fyri eitt 2 ára skeið. Vit liggja sostatt nakað omanfyri fleiri av kappingarneytum okkara í lønarvøkstri – ein gongd, ið helst ikki skal halda áfram.

Vinnuliga var 1999 eitt gott ár, og virksemi er sum heild nógv. Innan flestu vinnugreinir hevur framgongdin, í mun til undanfarna árið, verið heldur minni enn árini frammanundan. Í løtuni tykist tað, sum vit kanska standa ovast á einum búskaparligum heyggi. Innan fiskivinnuna hava bæði nøgdir og prísir gingið uppeftir síðani 1994/95. Í ár merkist minking í nøgdunum, veiðan av toski er minkað upp móti 30%, og hýsan er eisini minkað uml. 15%. Upsaveiðan er hinvegin økt uml. 20%.

Sjálvt um minkandi nøgdirnar hava merkt enn harðari kapping um fiskin, verður úrslitið hjá fiskavirkjunum sum heild heldur betri enn í fjør. Tað at fleiri virkir hava gjørt íløgur í nýggjan framleiðsluútbúna, og annars hava framt ábøtur á virkini, bendir á eina positiva gongd. Innan vinnuna verður mett, at økta kappingin um rávøruna ger tað truplari hjá teimum lítlu virkjunum at fylgja við. Tí eru tað helst størru virkini, ið fáa eitt gott ár.

Alingin hevur verið í støðugari framgongd seinastu árini, og í 1999 hevur gingið sera væl. Meðan útflutningurin í 1998 var knapt 22.000 tons, kemur hann væntandi upp á uml. 35.000 tons í 1999. Økingin í útflutningsvirðinum verður lutfalsliga størri, tí laksaprísirnir hava verið sera góðir seinra partin av árinum. Samstundis hava alifyritøkurnar áhaldandi megnað at minka um framleiðslukostnaðin. Vit kunnu tí vænta, at fleiri av hesum fyritøkunum koma út við methøgum yvirskotum fyri 1999. Innan alingina hava fleiri lagt seg eftir at góðska vøruna meira, serliga innan frystar portiónir. Henda gongdin er eitt framstig, men hon krevur sterkar fyritøkur. Slík framleiðsla merkir oftast fastar prísavtalur við útlendsku avtakararnar, og tá laksaprísurin hækkar so nógv sum seinra partin av árinum í ár, er trupult at fáa fíggjarliga javnvág, tí rávøran dýrkar.

Framgongdin innan fiskivinnuna og alingina seinastu árini hevur merkt framgongd innan aðrar vinnugreinir. Innan byggivinnuna er virksemi økt í 1999, tó eina mest í miðstaðarøkinum. Nakað av sethúsum er í gerð, umvælingar og ábøtur verða framdar, men av størri byggiarbeiðum er ikki nógv. Virksemið er tó økt so mikið innan byggivinnuna, at ávís lønarglíðing fer fram.

Hagtølini fyri lønarútgjaldingar vísa, at vøksturin innan skipasmíð og verkstaðsídnað hevur verið minni enn innan vinnuna á landi í miðal. Hetta speglar óivað, at vinnan er varin viðvíkjandi íløgum, sjálvt um tað fíggjarliga hevur gingið frama í nøkur ár. Ov stóru íløgurnar innan kreppuna eru ikki gloymdar enn.

Innan handilsvinnuna er stóra umsetningsframgongdin seinastu árini minkað nógv. Bæði heilsølur og størru matvøru- og klædnahandlarnir meta umsetningsframgongdina í 1999 at verða undir 5%. Hetta samsvarar við almennu hagtølini fyri 1. hálvár. Verður prísvøkstur tikin við í myndina, er nýtslan helst lítið økt.

Nýggja øldin og rákið innan vinnuna

Ilt er at spáa um framtíðina. Lítið er tó at ivast í, at við 1. útbjóðingarumfarinum til leiting eftir olju í føroyskum øki, fara vit vinnuliga inn í nýggja øld. Eina øld, ið bæði gevur nýggjar møguleikar og sum kann hava vansar við sær.

Kreppan í 90'unum hevur víst okkum, at torført er at byggja eitt vælferðarsamfelag á eina vinnugrein, har bæði nøgdir og prísir alda sum havið sjálvt. Neyðugt er, at vit fjøltátta vinnulív okkara, og her kann oljan geva nýggjar møguleikar, bæði í sær sjálvum og við skumpa undir ídnað og tænastuvinnur, so nýggjar útflutningsvinnur vaksa fram. Møguleikarnir skuldu verið góðir, tí hjá okkum er partur av ídnaði og tænastuvinnum tengdar at havinum, har eisini oljuvinnan kemur at balast.

Ein møgulig oljuvinna kann eisini verða við til at betra um flutningssambandið okkara við útheimin, og júst hetta er ein av fyritreytunum fyri, at nýggjar vinnur vinna fram.

Leiting eftir olju kann byrja summarið 2001, og áhugin fyri føroyska økinum og gongdin á atlantsmótinum vestan fyri Hetland kundi bent á, at møguleikarnir eru stórir fyri, at svarta gullið verður funnið. Óansæð vil hetta viðføra økt virksemi og harðari kapping um arbeiðsmegina, serliga tey við hollari útbúgving. Hetta kann viðføra økt lønartrýst, og kann skapa torfør lívikor hjá teimum vinnugreinum, ið eru í kapping við umheimin.

Hyggja vit at, hvat hendi í øðrum londum, tá oljan kom, kunnu vit vænta okkum eina tíð við stórum broytingum. Fiskivinnan, bæði á sjógv og landi, verður óivað rakt av, at torført verður at fáa fólk. Skundað verður tó bert undir gongdina, vit síggja í dag. Nærum allur okkara ungdómur tekur eina miðnámsútbúgving, og ásannast má, at fækstu teirra hava ein dreym um at arbeiða á flakavirki ella á skipsdekki.

Innan høvuðsvinnuna kann væntast, at vit síggja eina økta samanrenning millum fiskavirkir, skip og sølulið, og at eindirnar verða færri og størri – sama gongd sum vit hava sætt innan alingina. Ein partur av fiskavirkjunum vil hinvegin spesialisera seg meira og keypa um fiskamarknaðin. Drivmegin verður í báðum førum økt lønsemi, og í hesum viðfangi er eingin ivi um, at størri dentur verður lagdur á at gagnnýta slógv o.a. Fyri at verða minni heft av arbeiðsmegi fer fiskivinnan at dúva upp á økta automatisering.

Fiskivinnan fer frá produktorientering til í størri mun at vera stýrd av marknaðinum. Frá bara at hugsa um nøgd til í størri mun at hugsa um góðsku. Eisini kann væntast, at føroysk fiskivinna í alt størri mun fer at samstarva við fiskivinnu í grannalondunum. Henda gongdin og tann økta automatiseringin vil krevja meiri útbúna arbeiðsmegi.

Innan havbúnaðin fer gongdin móti størri eindum at halda áfram, og óivað eisini tann økta góðskingin av vøruni.

Seinastu árini er ein ávís altjóðagering farin fram innan vinnuna. Útlendskur kapitalur er komin inn í bæði fiski- og alivinnuna, og føroysk virkir samstarva í øktan mun við útlendsk feløg. Ein komandi oljuvinna vil óivað skunda undir altjóðageringina av føroyska vinnulívinum. Tí ein av fyritreytunum fyri, at føroysk virkir menna seg í oljuhópi er, at tey megna at skapa samstarv uteftir, ið tilførir tá vitan og royndir, sum vit mangla. Og økt samstarv uteftir vil kanska eisini vera við til at minka um ræðsluna fyri útlendskum íløgum.

Samanumtikið býður nýggja øldin okkum nógvar avbjóðingar. Um vit velja at síggja avbjóðingarnar sum møguleikar ella hóttanir, er í stóran mun upp til okkum. Og hugburður okkara kann vera avgerandi fyri, um møguleikar gerast til hóttanir ella øvugt.

Lat okkum møta avbjóðingunum, síggja tær sum møguleikar, fyrireika okkum væl, smoyggja upp um armar og fara í gongd!

Við ynski um gott og lønandi nýggjár.

Hotel Hafnia

– Dygdargóða hotellið í miðbýnum –

Nú árið og 20. øld er um at enda, senda vit vinum og viðskiftafólki um alt landið bestu ynski um eitt

signað nýár

við tøkk fyri trúfesti og alt gott í 1999.

HOTEL & MATSTOVA LETUR UPP AFTUR MÁNADAGIN 3. JANUAR KL. 12.00.

Við tøkk fyri farna tíð ganga vit við treysti komandi tíð ímóti. Verið vælkomin í komandi øld, ár 2000.

Við heilsanum

P/F HOTEL HAFNIA
M.C. & Johan og manning
Tlf. 313233 - Fax 315250